## Valencia ávegis til United

Sambært enskum miðlum er sannlíkt, at Luis Antonio Valencia úr Wigan spælur við Manchester United í komandi kappingarári. Fleiri feløg hava sýnt Valencia, sum er ættaður úr Ekvador, áhuga, men hann hevur eftir øllum at døma valt ensku meistararnar. Fleiri enskir miðlar skriva, at Manchester United er sinnað at gjalda 140 milliónir krónur fyri vongspælaran.



## Gongur einki hjá Clapson

Paul Clapson og liðfelagarnir úr Afturelding eru í tungum sjógvi í løtuni. Liðið liggur til niðurflyting í næstbestu íslendsku deildini. Um vikuskiftið tapti Afturelding við einum máli móti ongum á HK, sum er á fjórða plássinum. Felagið hjá Paul Clapson er nummar 11 av 12 liðum, men bara eitt stig er frá bjargingini. Clapson hevur framvegis einki mál skotið í hesum kappingarárinum.



Við hálvari bátslongd vunnu kvinnurnar á Gongurólvi fyri fjórðu ferð á rað. Kappingin er farin um helvt og hómast fyrsta FM-heitið hjá Havnar Róðrarfelag skjótt

Mynd: Jens Kristian Vang

# Gongurólvur rennur undan

**Kvinnurnar hjá Havnar Róðrarfelag vístu enn eina ferð kvinnunum úr Klaksvík og av Glyvrum frá sær**

6-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*

Fyri fjórðu ferð av fýra møguligum vann Gongurólvur við kvinnumanning FM kappróður í ár, tá ið tað leygardagin varð kappast á Trongisvágsfirði. Harvið er Gongurólvur stórfavorittur at vinna FM, sum báturin hjá Havnar Róðrarfelag við kvinnumanning ikki hevur átt síðani 2003.

Merkisvert var tað eisini, at vinnaratíðin var framúr góð og so nógv tann besta, síðani fasti starturin varð tikin í nýtslu á Jóansøku á Trongisvágsfirði.

Fyri tíggju árum síðani vann Jarnbardur við 5.06.12. Inntil leygardagin var hetta besta vinnaratíðin hjá 6-mannaførum við kvinnum á Trongisvágsfirði. Hesa ferð var vinnaratíðin hjá Gongurólvi 4.49.02, og allir seks bátarnir komu á mál í betri tíð, enn vinnaratíðin hjá Jarnbardi var fyri tíggju árum síðani.

Hesa ferð vóru líkindini av teimum bestu – slætt og eitt lítil lot undan – men tó skal einki takast frá avrikinum hjá serliga Gongurólvi.

Kappingin var tó rættuliga tøtt. Sølmundur, Páll Fangi og eisini Jarnbardur vóru væl við, og tá ið bátarnir fóru um málið, var tað ikki leyst ímillum fýra teir fremstu.

Gongurólvuir var eina hálva bátslongd frammanfyri Páll Fanga,, sum var skutin frammanfyri Sølmund, ið aftur var tað mesta av einari bátslongd frammanfyri Jarnbard.

# Frúgvin er full í sjálvsáliti

**Við sigrinum á Jóansøku hevur Frúgvin lagt seg upp á síðuna á Erlu Kongsdóttir í kappingini um FM**

5-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*

Tað er tætt, og tað er ógvuliga spennandi. Eftir at Frúgvin úr Miðvági vann á Erlu Kongsdóttir úr Fuglafirði í kappingini millum 5-mannafør við kvinnumanning, eru hesir báðir bátarnir púra javnir í FM kappingini.

Bátarnir hava vunnið tvær ferðir í part, og tvær ferðir í part hava bátarnir verið næstfremstir. Stigatalið er 26 í part, áðrenn fimta kappingin í ár verður í Fuglafirði nú leygardagin.

Á Jóansøku var starturin hjá Erlu Kongsdóttir góður, men tað var skjótt, at Frúgvin loftaði sær. Tá ið málið var umleið hálvt rógvið, legði Frúgvin seg framum, og so øktist munurin millum teir teir fremstu bátarnar.

Eina løtu var mest sum leyst millum Frúnna og Erlu Kongsdóttir. Men í endaspurtinum royndi Erla Kongsdóttir at svara aftur. Tað eydnaðist ikki teimum úr Fuglafirði at vinna. Tá ið bátarnir fóru um málið, var Frúgvin skutin frammanfyri Erlu Kongsdóttir.

Hóast báðir bátarnir nú liggja stavn um stavn í FM kappingini, so ber gongdin seinastu vikurnar við sær, at tað eru tær á Frúnni, sum eiga sinniliga yvirskotið. Úrslitini gera, at tær eiga at fara við størri sjálvsáliti undir kappingina í Fuglafirði, enn tær á Erlu Kongsdóttir kanska hava, eftir at tað tvær tær seinastu ferðirnar ikki hevur hilnast so væl, sum tað gjørdi tvær tær fyrstu ferðirnar.

Men nú hevur Erla Kongsdóttir møguleikan í heimasjógvi!



Manningarnar úr Miðvági eru sera væl fyri í ár. Eftir at tær vóru nummar tvey báðar tær fyrstu stevnurnar, hava kvinnurnar á Frúnni við sigrinum á jóansøku hálað seg upp á síðuna á Erlu Kongsdóttir úr Fuglafirði

Mynd: Jens Kristian Vang